# AB er á veg móti næstbestu deildini

*3. deild: Einasta hóttanin móti beinleiðis uppflyting hjá argjamonnum verður um næstbesta liðið hjá B36 flytir niður úr 2. deild*



*Oddbjørn Joensen og AB stevna beint móti 2. deild. Sunnudagin gjørdi leikandi venjarin sjálvur 5 mál*

AB hevur beina kós móti næstbestu deildini. Støðutalvan vísir hetta, eftir at ein triðingur av kappingini er spældur.

B36 er framvegis sera sannførandi. Í fjør flutti B36 upp í 2. deild. Seinna partin av kappingini høvdu teir sum mál at skora í minsta lagið eitt hundrað mál. Tað málið náddu teir væl og virðiliga. Nú er trioðja liðið hjá B36 í 3. deild. Gongdin har er so sannførandi, at alt bendir á, at teir eftir summarsteðgin fara at seta sær sama mál, sum næstbesta liðið hevði í fjør.

Næstbesta liðið hjá B36 tapti leygardagin í Runavík, men enn er einki, sum bendir á, at teir skulu flyta niður. Megnar B36 at varðveita sítt lið í 2. deild, og um B36 verður ovast, tá átjanda umfarið verður liðugt, so fer beinleiðis uppflytingarmøguleikin til næstbesta liðið í 3. deild.

AB er á næstovasta plássi, og nógv, sum nú vendir niður, skal venda upp, um plássið skal verða tikið frá argjamonnum. Umframt B36 hevur KÍ lið í bæði 2. og 3. deild. AB kappast sostatt við B68, Skála, ÍF, B71, VB, TB og FS Vágar um uppflytingarplássið. Nú ein triðingur av kappingini er farin, er AB sjey stig frammanfyri B68 og átta frammanfyri Skála. Málmunurin hjá AB er væl betri, enn hann er hjá B68 og Skála. Tað vil við øðrum orðum siga, at B68 skal brúka í hvussu so er trý umfør fyri at leggja seg framum AB. Vit kunnu tískil staðfesta, at hóttanin móti argjamonnum fer fyrst og fremst at koma úr botninum í 2. deild.

### FS Vágar–VB

Tá Petur Niclassen longu í 2. minutti legði heimaliðið framum kundi tað sæð út til, at vágbingar skuldu halda fram á niðurflytingarplássinum. Men tað lagaði seg øðrvísi, og nú mugu teir í Vágum finna seg í, at teir eru niðast bæði í 1. og í 3. deild.

Stóri maðurin hjá VB var miðvallarin Kári í Lágabø. Henda unga spælaran fara vit ivaleyst at hoyra meiri til í framtíðini. Hann javnaði í 9. minutti, Egil Steintórsson legði VB framum í 25. minutti, og so var Kári í Lágabø tvær ferðir upp á spæl tíðliga í 2. hálvleiki.

4–1 er ein trivalig leiðsla. Men í 3. deild kann tað ganga skjótt hvønn vegin. Níggju minuttir eftir, at VB var komið upp á 4–1, var støðan 4–3, og teir síðstu tjúgu minuttirnar var tað heilt spennandi. Møguleikar vóru báðar vegir, men Jóhan á Mýrini í heimamálinum, og Finnbogi Olesen í VB málinum megnaðu báðir at halda tætt.

### B68–Skáli

Í 1. deildardystinum móti NSÍ skifti Jóannes Jakobsen ongan mann inn. Tí var næstbesta B68 liðið væl mannað, tá teir beint eftir sigurin á NSÍ spældu móti grannaliðnum av Skála. Øssur Jacobsen, Mannbjørn Nesá og Bogi Petersen, sum allir eru spælarar við framtíðini fyri sær, høvdu sitið á beinkinum á besta liðnum.

At hjálpa sær høvdu teir fleiri veteranar, sum fleiri ferðir hava vunnið FM í 1. deild, t. d. Kjartan Nesá, Edmund Jacobsen, Aksel Højgaard og Ingolf Petersen og so Jóannes Jakobsen.

Skáli hevur ikki staðið seg væl higartil. Nú tykist gongd vera komin á, men á Svangaskarði megnaðu hvørki teir ella B68 at skora mál.

### B36–KÍ

Enn eina ferð var tað sjón fyri søgn, at KÍ á heimavølli og á útivølli í 3. deild er heilt hvør sítt. Teir hava vunnið tríggjar heimadystir, og teir hava tapt tríggjar útidystir.

Hesa ferð taptu klaksvíkingar 6–0, men tað var kanska ikki so nógv at siga, til, tí teir spældu móti avgjørt besta liðnum í deildini.

Seks ferðir noyddist Sigurd Mikladal í meskarnar eftir bóltinum, og nógvir av málskjúttunum vóru gamlir kenningar í fremstu røð. Pól N. Joensen í heimamálinum hevði ein friðarligan dag.

### TB–B71

Hallur Christiansen var sjúkur leygardagin, tá besta liðið hjá TB fór norður til Fuglafjarðar. Tað var sjálvandi ein missur, men tað kom væl við hjá 3. deildarliðnum. Sunnudagin skoraði Hallur trý mál móti sandoyingum, og tað var fyrst og fremst ungi og væl vandi maðurin, sum var munurin á liðunum.

Besta málið á Sevmýri sunnudagin var tað til 4–0. Miðvallarin Andrass Nolsøe sendi úttanvert brotsteigin upp undir samankomingina.

Páll á Reynatúgvu var fyrst aftasti verjumaðurin hjá B71. Tá teir vóru lagdir afturum við fleiri málum, fór løgtingsmaðurin fram í álopið, og honum eydnaðist at skora tvey mál. Tað til 4–1 var hegnisliga potað upp undir tvørtræið eftir óbeinleiðis fríspark, sum var dømt tí TB málverjin hevði brúkt hendurnar í sambandi við afturlegging.

### ÍF–AB

Fuglfirðingar hava kanska verið teir, sum hava verið størsta vónbrotið higartil í ár.

Tá AB vitjaði var ÍF niðurspælt seinnapartin av fyrra umfarinum, og tá skoraði AB tríggjar ferðir. Inntil gestirnir øktu til 2–0 var spenningur í, og ta løtuna hevði ÍF tveir stórar møguleikar, sum teir misnýttu.

Stóri maðurin hjá AB var spælandi venjarin, Oddbjørn Joensen. ÍF var skipað í 4–4–2, meðan mótstøðumenninir vóru skipaðir í 3–5–2. Tað hevði við sær, at AB, sum seinna partin av fyrra umfarinum spældi fínt, var yvirmannað á sentrala miðvøllinum, har Oddbjørn Joensen í Hagi stíli dusaði sær í álopspartinum og var so mikið leysur, at hann fekk skora fimm mál. Tað fyrsta langskoti var frágera gott, eitt langskot tók í ein mótstøðumann, meðan hini trý vórðu skumpað í málið eftir gott uppspæl og innlegg.

JH

### Úrslit

6. umfar

**FS Vágar–VB 3–4 (1–2)**
1–0: Petur Niclasen 2.
1–1: Kári í Lágabø 9.
1–2: Egil Steintórsson 25.
1–3: Kári í Lágabø 57.
1–4: Kári í Lágabø 60.
2–4: Petur Niclasen 62.
3–4: Eyðfinn Fjalsbak 69.

**B68–Skáli 0–0**

**B36–KÍ 6–0 (3–0)**
1–0: Kári Gullfoss 15.
2–0: Regin Arge 16.
3–0: Kári Johansen 42.
4–0: Kenneth Joensen 58.
5–0: Tummas Eli Hansen 78.
6–0: Petur Martin Johansen 89.

**TB–B71 5–2 (3–0)**
1–0: Niels Gunnar Petersen br
2–0: Hallur Christiansen
3–0: Hallur Christiansen
4–0: Andrass Nolsøe
4–1: Páll á Reynatúgvu
5–1: Hallur Christiansen
5–2: Páll á Reynatúgvu

**ÍF–AB 2–6 (0–4)**
0–1: Oddbjørn Joensen 7.
0–2: Svend Poulsen 25.
0–3: Oddbjørn Joensen 29.
0–4: Oddbjørn Joensen 38.
0–5: Oddbjørn Joensen 50.
1–5: Rúni Jacobsen 67.
1–6: Oddbjørn Joensen 77.
2–6: Sigfríður Abrahamsen 78.

### Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Oddbjørn Joensen | AB | 9 |
| Signar Johannesen | AB | 6 |
| Egil Steintórsson | VB | 6 |
| Kári í Lágabø | VB | 6 |
| Aksel Højgaard | B68 | 5 |
| Dánial Petur Johansen | B36 | 4 |
| Regin Arge | B36 | 4 |
| Petur Niclasen | FS Vágar | 4 |
| Aksel Johannesen | KÍ | 4 |
| Svend Poulsen | AB | 3 |
| Tumas Eli Hansen | B36 | 3 |
| Vinjard Guttesen | B36 | 3 |
| Jóannes Jakobsen | B68 | 3 |
| Kristoffur Vidtfeldt | B71 | 3 |
| Páll á Reynatúgvu | B71 | 3 |
| Jákup Baldvinsson | ÍF | 3 |
| Eyðun Svalbard | TB | 3 |
| Hallur Christiansen | TB | 3 |
| Just Johannesen | TB | 3 |
| Kaj Roest | TB | 3 |
| Niels Gunnar Petersen | TB | 3 |
| Bárður Johannesen | AB | 2 |
| Fróði Stenberg | AB | 2 |
| Heri Petersen | AB | 2 |
| Jóannes Bæk | AB | 2 |
| Petur Ritter | AB | 2 |
| Bjarki Sørensen | B36 | 2 |
| Petur Martin Johansen | B36 | 2 |
| Arnfinn Olsen | B68 | 2 |
| Bogi Petersen | B68 | 2 |
| Kristian Poulsen | B68 | 2 |
| Magnus Simonsen | FS Vágar | 2 |
| Tróndur Ravnsfjall | FS Vágar | 2 |
| Jógvan Arnfinn Langgaard | ÍF | 2 |
| Leivur á Lakjuni | ÍF | 2 |
| Rúni Jacobsen | ÍF | 2 |
| Sigfríður Abrahamsen | ÍF | 2 |
| Bogi Isaksen | KÍ | 2 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 2 |
| Símun Joensen | KÍ | 2 |
| Bogi Gregersen | Skála | 2 |
| Ólavur Klein Olsen | Skála | 2 |
| Pauli Hansen | Skála | 2 |
| Hans A. Niclasen | VB | 2 |

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 6 | 6 | - | 0 | - | 0 | 25 | 4 | 21 | 18 |
| 2 | AB | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 32 | 10 | 22 | 15 |
| 3 | KÍ | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 15 | 28 | -13 | 9 |
| 4 | B68 | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 17 | 14 | 3 | 8 |
| 5 | TB | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 20 | 18 | 2 | 8 |
| 6 | Skála | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 12 | 15 | -3 | 7 |
| 7 | ÍF | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 15 | 22 | -7 | 6 |
| 8 | B71 | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 12 | 19 | -7 | 6 |
| 9 | VB | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 16 | 29 | -13 | 6 |
| 10 | FS Vágar | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 12 | 17 | -5 | 4 |



## Sigling á Norðoyastevnu

Leygardagin 3. juni verður siglt soleiðis:

### *Dúgvan*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tórshavn - Klaksvík | kl. | | 10:30 |
| Klaksvík - Leirvík | kl. | 12:20 | 13:40 |
| Leirvík - Klaksvík | kl. | 13:00 | 14:20 |
| Klaksvík - Tórshavn | kl. | | 20:00 |

Túrarnir millum Havnina og Klaksvík eru fyrst og fremst ætlaðir róðrarfólki.

Samband er millum Havnina og Leirvík við Bygdaleiðum.

### *Ternan*

Røkir vanligu rutuna sum lýst um Norðoyastevnuna í galdandi ferðaætlan.

### *Claymore*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tvøroyri - Tórshavn | kl. | 07:00 | 17:15 |
| Tórshavn - Tvøroyri | kl. | 10:30 | 22:00 |

Samband er við Bygdaleiðir.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Rutuupplýsingin: 34 30 30
Heimasíða: www.ssl.fo

## Fráboðan

Grundlógardagin, mánadagin 05 juni 2000, hava allir deildir sparikassans stongt

Vinarliga

FØROYA SPARIKASSI


# Betri svøvn

**BIOflex magnetviðgerð tí:**

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Sosialurin - 311820

Ring 21 79 16

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Viðgerð, ið virkar ímóti:**

- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

BIOflex® MAGNET TERAPI

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916





JÁSPI KETLAR

Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000


## Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Søkt verður eftir sjúkrahjálpara/sosial- & sunnheitsassistenti til fulltíðarstarv í skiftandi vaktum frá 1. august 2000.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrahjálparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 371666 lokal 147.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
Fyristøðukvinnan
800 Tvøroyri
innan 15. juni 2000.

## Lastbilur við krana

Ford Tranist, diesel, byggiár 1988, lastar 1,1 tons, til sølu.

**P/F Vestmanna Timburhandil**
**Telefon 42 41 70 · Fax 42 44 27**

## Fuglafjarðar Javnaðarfelag

Aðalfundur og 1. uppstillingarfundur til kommunuvalið verður í ÍF-húsinum í kvøld fríggjakvøldið 2.6. kl. 20.

**Fuglafjarðar javnaðarfelag**

*Halt* **sosialin**

## Avloysari

**Avrokningarskrivstovan**

Vegna barnsburðarloyvi verður søkt eftir avloysara til Avrokningarskrivstovuna at byrja sum skjótast. Setanin varir til 1. mars 2001.

Á Avrokningarskrivstovuni arbeiða 11 fólk, sum fáast við fakturering og debitorrøkt v.m.

Arbeiðsstaðið er á Hálsi í Havn.

Tann, ið sett/ur verður, skal hava skrivstovuútbúgving ella royndir frá skrivstovuarbeiði.

Royndir í arbeiði við teldum er ein fyrimunur

Starvið er lønt sambært sáttmála við Starvsmannafelagið og Føroya Tele.

Tann, ið vil hava meira at vita, kann venda sær til Jákup Danielsen á tel 243370.

Umsóknir skulu vera inni í seinasta lagi 16. juni 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355